Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

## Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 23.06.2016 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 49/16 | 16/00686-2 | Býráðslimur burturstaddur - Signhild V. Johannesen |
| 50/16 | 16/00531-3 | Staðbundin nevnd fyri Ánirnar |
| 51/16 | 16/00606-3 | Nýggj útstykking á Fossum - Kristian Eli Zachariasen, býráðslimur |
| 52/16 | 16/00549-4 | Stuðul til film "NINA" - Maria Winther Olsen |
| 53/16 | 15/00580-9 | Klaksvík sum demensvinarligur býur - átøk í 2016 – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 54/16 | 14/00331-15 | Hitaskipanin á Læknamiðstøðini – Afturvendandi trupulleikar – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 55/16 | 16/00022-6 | Asfalteringin í 2016 – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 56/16 | 16/00047-1 | Fíggjarætlanin á Skúlatrøð 2016, játtanin skerd – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 57/16 | 16/00567-3 | Eykajáttan 2016 - Mentanarøkið – *fyrra viðgerð* |
| 58/16 | 16/00640-1 | Strategi fyri framtíðar virksemið hjá NBH – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 59/16 | 16/00390-2 | Umsókn um marknaumskipan, byggilinju framvið sjóvarmálan v.m. á Bumshamri v.m. |
| 60/16 | 16/00584-2 | Uppískoytisstykki til matr. nr. 1613, Dánjal Poulsen - Búnaðarstovan |
| 61/16 | 11/00290-98 | Bussleiðin víðkast til eisini at umfata Árnafjørð – *eykajáttan, seinna viðgerð* |

## 49/16
## 16/00686 Býráðslimur burturstaddur - Signhild V. Johannesen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 49/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Signhild V. Johannesen, býráðslimur, hevur boðað borgarstjóranum frá, at henni berst frá at røkja starvið í meira enn samfullar 14 dagar og tí ynskir, at fyrsti varalimur floksins fær boð at møta til býráðsfundin 23. juni 2016.
Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti tiltakslimur floksins Tummas Lervig.

**Lógargrundarlag:**
KSL, § 18:

*Stk. 2*. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
*Stk. 3*. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at lata Tummas Lervig taka sæti á fundinum 23. juni 2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið samtykt, og Tummas Lervig tók sæti.

## 50/16
## 16/00531 Staðbundin nevnd fyri Ánirnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 43/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 50/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi dagfest 21. apríl 2016 hevur Klaksvíkar kommuna fingið tilsent skriv frá borgarum búsitandi í Ánunum við áheitan um, at bygdin Ánirnar fær eina staðbundna nevnd. Mælt verður til at skipa so fyri, at tað verður møguligt at velja hesa nevnd í samband við kommunuvalið í heyst.
Saman við skrivinum er hjálagt undirskriftir frá 21 borgarum í Ánunum.

Í skrivinum verður grundgivið við, at bygdin Ánirnar er vaksin nógv seinastu árini, við hesum gerast ynskini eisini fleiri, bæði til ymiskt innan tekniska økið og trivnaðin. Somuleiðis at tey eru næsti granni hjá stóru Norðhavnini.

Eisini verður víst á, at nú Klaksvíkar kommuna 1. januar 2017 fer at fevna um ein bý, tríggjar oyggjar og átta bygdir, er áheitanin á kommununa um at viðurkenna Ánirnar sum næststørstu bygd í kommununi og tí geva borgarunum í Ánunum møguleika fyri at velja eina staðbundna nevnd.

Í § 37 í kommunustýrislógini er heimild hjá kommunum at seta staðbundna, ráðgevandi nevnd til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

Verandi staðbundu nevndir í kommununi eru skipaðar sambært kommunustýrisskipanini hjá Klaksvíkar kommunu á fylgjandi hátt: 5 limir eru í nevndini. Tríggir valdir av og millum borgarnar í økinum, nevndin fevnir um. Ein valdur av býráðum millum limir tess. Fimti limurin er borgarstjórin, ið er føddur formaður.

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.
Kommunustýrisskipan fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar útyvir samsýningar til limirnar í staðbundu nevndini.

**Tilmæli:**
Verður lagt fyri fíggjarnevndina til støðutakan.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við at seta eina staðbundna nevnd fyri Ánirnar.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 51/16
## 16/00606 Nýggj útstykking á Fossum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 13.06.2016 | 49/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 51/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 8. juni 2016, har greitt verður gjøllari frá ætlanini um nýggja útstykking uppi á Fossum.

Upplýst er, at tað eru fleiri umsøkjarar, sum standa á bíðilista til at fáa grundstykki undir Fossum.

Heitt verður tí á TU um at fara í holt við at ogna kommununi lendi til ætlanina. Á býraðsfundi 1. apríl 2008 er samtykt at fara undir eina tilgongd um at keypa landsjørðina – umleið 36.000 $m^2$ svarandi til ein kostnað á umleið 4 mill. kr.

TU hevur við útgangsstøði í skitsu dagfest 30.04.2007 frá Selmar Nielsen arkitekti viðgjørt málið av nýggjum. Viðmerkjast skal, at skitsan bert er vegleiðandi og ikki endaliga samtykt av býráðnum.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mett upphædd fyri at ogna sær lendi til 1. og 2. útstykkingarstig er umleið 5,5 mill. kr. Peningur er ikki settur av til ætlanina í inniverandi ári. Um so er, at viðkomandi nevndir mæla til, at arbeitt verður víðari við ætlanini, verður mælt til, at peningur verður settur av til keyp av lendi í 2017. Harumframt skal peningur játtast til vegagerð og leiðingar, mettur kostnaður 5,0 mill. kr.

Sambært fyribils útrokning skulu stykkini seljast fyri á leið 450 tkr. stykkið.

**Tilmæli:**

Málið verður hervið lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til viðgerðar/støðutakan.

**UBN 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting 08-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá UBN 13-06-2016 einmælt samtykt.

## 52/16
## 16/00549 Stuðul til film "NINA" - Maria Winther Olsen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2016 | 28/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 46/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 52/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 8. juni 2016 við frágreiðing um innkomna umsókn um stuðul til filmsverkætlanina “NINA”. Samlaða verkætlanin er mett at kosta 1 mill. kr.

Sum tað framgongur í viðlagda tilfari, hevur tað longu eydnast stigtakarunum at skaffa kr. 400.000, og er sostatt ein fíggingartørvur áljóðandi kr. 600.000 eftir at fáa til vega.

**Lógargrundarlag:**
Fíggjarætlanin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avseting til endamálið

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at
1. veitt verður tilsøgn um kr. 200.000,- sum stuðul til filmsverkætlanina,
2. peningurin fellur til gjaldingar, tá ið verkætlanin er liðug – einaferð í 2017,
3. peningur verður settur av serskilt til endamálið á komandi fíggjarætlan – “Filmsverkætlan, NINA”, og at
4. tilsøgnin stendur við til 31. des. 2017 – og verður at søkja um møguliga leingjan av freistini, um filmurin ikki er liðugur tá.

**MeN 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, 8. juni 2016.
*Við á fundinum vóru eisini Maria Winther Olsen, instruktør og Fie Liv Bratfeldt, produsari, sum greiddu frá filmsverkætlanini.*

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við MeN 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**53/16**
**15/00580 Klaksvík sum demensvinarligur býur, átøk í 2016 –** *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 5/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 47/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 53/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Starvsfólkini á Búðatrøð hava sent Klaksvíkar kommunu skriv við uppskotum um, hvussu Klaksvík kann gerast ein betri býur fyri tey, sum hava sjúkuna demens.

Her er nógv at fara í holtur við, og tí er neyðugt at gera eina raðfesting av átøkum, sum kommunan vil stuðla fíggjarliga. Valið fall á hesi trý:

- Gera kunnandi faldara um demens (kommunan rindar kostnaðin)
- Skipa fyri evnisdegi um demens í september (kommunan rindar fyri hølisleigu og møguliga fyrilestrarhaldarar)
- Skipa fyri aktivitetum, sum venda sær til menn við demens (sjómanslív)
  *T.d. kommunan leigar Dragan 8 ferðir gjøgnum summarhálvuna*

Mælt verður til, at kommunan ber fíggjarligan kostnað á kr. 80.000,- til omanfyrinevndu átøk, og at upphæddin verður fíggjað av tøkum peningi.

**Lógargrundarlag:**
Eldralógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan er um eina eykajáttan til endamálið.

| | |
|---|---|
| Seta upp og prenta faldara (500 eintøk) | kr. 6.000 + mvg |
| Evnisdagur í september 2016 | kr. 25.000 |
| 8 leigutúrar við Draganum á 3 tímar (2.000 kr/t) | kr. 48.000 |
| **Tilsamans** | **kr. 79.000** |

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at kommunan játtar at lata kr. 80.000,- til tey trý raðfestu átøkini, sum hava til endamáls at gera Klaksvík til ein demensvinarligan bý.

**TrN E&B 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, men við tí broyting at upphæddin verður hækkað til kr. 100.000,-

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**

Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 54/16
## 14/00331 Hitaskipanin á Læknamiðstøðini; afturvendandi trupulleikar – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 4/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 48/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 54/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 8. juni 2016.
Í ovaru helvt av Læknamiðstøðini er støðan ótolandi, tá sólin skínur. Hetta hevur verið ein afturvendandi turpulleiki, og ymiskt hevur verið gjørt fyri at bøta um støðuna, men tíverri til fánýtis. Starvsfólkini á Læknamiðstøðini gera nú aftur vart við ótolandi inniklimaðið, sum lættliga fer upp á 28 til 30 hitastig, hóast tey hava vindeygu opin. Har er ikki inniverandi, siga tey.

**Lógargrundarlag:**
Kunngerð nr. 64 frá 29. sept. 2004 um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m av viðtaluhølum til kommunulæknaskipan:

***§ 5.** Viðlíkahald, ið kommunan ber útreiðslurnar av, fevnir um útskifting ella umvæling av viðtaluhøli, innbúgvi, tólum og amboðum skjótast gjørligt, tá tørvur er á hesum.*

*Stk. 2.* ***Versna arbeiðsumstøðurnar ella arbeiðsgóðskan hjá kommunulæknanum, orsakað av, at tólini ikki verða skift út ella viðlíkahildin, eigur umvæling og útskifting at fara fram skjótast gjørligt.***

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Umsjónarmaðurin upplýsir, at kostnaðurin er uml. 100.000,- kr. Upphædd av hesi støðd er ikki møgulig at fíggja av rakstarjáttanini, sum er til “kommunulæknar”, og tí verður biðið um, at hetta kann fíggjast av tøkum peningi – meirinntøkur hjá Klaksvíkar kommunu.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at uppsetingin av sólskerming á Læknamiðstøðini kann verða framd sum skjótast, og at kostnaðurin á 100.000,- kr. verður fíggjaður av tøkum peningi.

**TrN E&B 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við at játta peningin, so arbeiðast kann víðari við at loysa klimatrupulleikan á Læknamiðstøðini.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 55/16
## 16/00022 Asfalteringin í 2016 – *Eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 16.06.2016 | 20/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 49/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 55/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 3. juni 2016, har greitt verður frá uppskoti um at hækka upphæddina til asfaltering við 1,2 mió. kr. í 2016. Nevnda eykajáttan viðførir, at samlaða avsetingin fer úr 2,26 til 3,46 mió. kr.

Samlað upphædd til møguliga sáttmálabinding fer úr 1,6 til 2,8 mió. kr.

Sum kunnugt er eftirsleipið stórt hjá landi og fleiri kommunum, og er hetta eisini galdandi fyri Klaksvíkar kommunu. Tekniska Umsiting og Vegadeildin hava vegleiðandi mett um eftirsleipið:

- Kommunalir vegir: 15,0 mió. kr.
- Gongubreytir: 5,0 mió. kr.

Upplýst er, at ætlanin er at nýta eykajáttanina til m.a. Víkavegin og onnur vegastrekki, har nógv slit er. At asfaltera allan Víkavegin er mett at kosta 1,3 mió. kr., og Bumshamarsvegurin er mettur til 735 tkr.

Upplýst verður eisini, at partur av Víkavegnum, frá Julius Poulsen til Álv Magnussen, verður gjørdur av nýggjum við gongubreyt í báðum síðum.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Hóast avsetingin til vegir viðlíkahald er økt seinastu árini, so megnar kommunan ikki at halda vegirnar í nóg góðum standi, tí slitið pr. metur veg er meira enn tað, sum asfalterað verður. Mett verður, at kommunan komandi árini skal seta munandi størri upphædd av til asfalteringsviðlíkahald.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið um eina eykajáttan til asfaltering á 1,2 mió. kr. lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð til viðgerðar/støðutakan. Málið viðførir, at rakstrarsíðan á fíggjarætlanini hækkar við 1,2 mió. kr., og tøki peningurin minkar samsvarandi.

**TN 16-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 03-06-2016 og mælir til, at hesir vegir verða tiknir við: Hamarsniðið, Víkavegurin og Bumshamarsvegur.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TN 16-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**

Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 56/16
## 16/00047 Fíggjarætlanin á Skúlatrøð 2016, játtanin skerd – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 1/16 | |
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 24/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 50/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 56/16 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Í skrivi frá umsitingini, dagfest 13. januar 2016, verður greitt frá tørvinum á eykajáttan í samband við skerda játtan á fíggjarætlanini 2016 til á Skúlatrøð.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sum kunnugt, er hølisleiga ikki ein útreiðsla, sum ein uttan víðari sleppur undan í verandi umstøðum, og tað er tí ilt at umgangast, at fólkaskúlin noyðist at lata hesa skerjing av samlaðu játtanini ganga út yvir tær variablu rakstrarútreiðslurnar, so sum undirvísingartilfar og líknandi.

**Tilmæli:**
Umsitingin sær tí ongar aðrar møguleikar fyri loysn á hesum máli enn at mæla til, at nevnda, skerda rakstrarjáttan, nú verður játtað fólkaskúlanum aftur sum ein eykajáttan nú við ársbyrjan 2016, so skúlin kann halda fast við ta ætlan fyri árið 2016, sum hann hevur lagt í sambandi við hesa fíggjarætlanarviðgerðina.

**TrN B&U 19-01-2016:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi nevndarumfar.

**TrN B&U 14-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 13-01-2016.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 14-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 57/16
## 16/00567 Eykajáttan 2016 – Mentanarøkið – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.06.2016 | 31/16 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 14.06.2016 | 23/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 51/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 57/16 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Umsitingin greiðir í skrivi dagfest 8. juni 2016 frá ætlanum um at gera nýggj spælipláss í kommununi og at fremja innkeyp av útgerð til hesi í ár.

Á fíggjarætlanini í 2016 eru avsettar kr. 70.000,- til keyp av útgerð, men væntandi er tørvurin kr. 400.000,-. Til tess at fremja innkeyp er tí tørvur á kr. 330.000,- til "íløgur spælipláss", sum saman við flyting av kr. 70.000,- frá rakstri til íløgur, kann nøkta tørvin, til tess at fáa framt innkeypið í ár.
......
Umsitingin greiðir harumframt frá, at tørvur er á umvælingum og nýgerð av gomlum installatiónum í Svimjihøllini. Ein meting er, at tørvur er á kr. 400.000,- til hesar íløgur. Ætlanin er, at fremja arbeiðið í seinsta ársfjórðingi í 2016.
.....
Greitt verður eisini frá, at í fleiri umførum er kunnað um, at tørvur er á tillagingum í rakstrinum, tá talan er um stuðul til ítróttar- og frítíðarfeløg.

Mælt verður tí til at hækka fíggjarætlanina við:

Kr. 330.000,- til íløgur spælipláss
Kr. 400.000,- til íløgu svimjihøll
Kr.   20.000,- verður flutt frá rakstri mentan til rakstur Skúlin

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarætlanin hækkar við kr. 730.000,- til íløgur

**Tilmæli:**
Mælt verður til taka undir málinum.

**MeN 16-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum – og at ferð verður sett á ognan av lendi í Ánunum, og at staðsetingin av økinum í Ánunum verður nr. trý í røðini.

**TrN B&U 14-06-2016:** Nevndin tekur undir við MeN 13-06-2016.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TrN 14-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

**58/16**

## 16/00640 Strategi fyri framtíðar virksemið hjá NBH – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Eldri & Bústaðir" | 14.06.2016 | 6/16 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2016 | 52/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 23.06.2016 | 58/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 29.09.2016 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Arbeiðið við at kanna eldraøkið er nú komið at enda. Samrøðufundir hava verið við brúkarar, avvarðandi, starvsfólk og serkøn starvsfólk, sum samstarvað verður við á eldraøkinum. *Lóður* hevur staðið fyri eini umfatandi nøgdsemiskanning, ið hevur fevnt um brúkarar, avvarðandi og starvsfólk. Eftir kanningina eru øll starvsfólk á eldraøkinum kunnaði, og samrøðufundir hava verið skipaðir við allar deildir, har Lóður saman við leiðslu og formanni í NBH hava luttikið.

Arbeiðið hevur givið sera gott innlit í økið og hevur sett orð á fleiri av avbjóðingunum, ið økið stendur yvir fyri. Somuleiðis hevur hetta givið leiðsluni møguleikar fyri at hoyra ymisk sjónarmið og avstemmað væntanir.

Stýrið fyri NBH hevur havt fund um framtíðar strategi, og hevur í hesum sambandi samtykt eina eykajáttan áljóðandi 2 mió. fyri inniverandi ár.

Samtykt frá stýrinum:
*Stýrið tekur undir við samlaðu tilmælunum í skrivinum "Strategi fyri framtíðar virksemi hjá NBH", dagfest 02-06-2016, og at játtanin fyri 2016 verður hækkað við 2 mió. kr.*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fíggjarliga merkir hetta, at raksturin fyri Klaskvíkar kommunu hækkar við kr. 1.737.143. Restin verður fíggjað av hinum kommununum í samstarvinum.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við stýrinum fyri NBH og hækka raksturin tilsvarandi.

**TrN E&B 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við Stýrinum fyri NBH um at hækka raksturin, samsvarandi tilmælinum.

**FíN 21-06-2016:** Nevndin tekur undir við TrN E&B 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá FíN 21-06-2016 einmælt samtykt.

## 59/16
## 16/00390 Umsókn um marknaumskipan, byggilinju framvið sjóvarmálan v.m. á Bumshamri v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 13.06.2016 | 47/16 | |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 15.06.2016 | 16/16 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 59/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Eigarin av matr. nr. 30 í Klaksvík spyr um møguleikan fyri marknaumskipan millum neystagrundøkini matr. nr. 29, 30 og 31 og flytan av byggilinju nakað út í kommunala fjørulendið.
Í sama skrivi ynskir hann at vita kommununnar ætlanir við vegi til neystaøkið.
Byggisamtyktarliga er talan um D20 (Grønt øki/neystaøki)




**Lógargrundarlag:**
Matrikuleringslógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Tekniska Umsiting

- hevur onki ímóti, at marknaumskipan verður framd sambært innsenda uppskotinum frá Alix Rasmussen – hetta sjálvandi treytað av, at allir eigararnir standa aftanfyri ynski umsøkjarans og mælir annars til
- at gongugeil verður tinglisin framvið eysturmarkinum á matr. nr. 28 og 33, hetta so allar neystagrundirnar hava sama atkomumøguleika
- at marknalinjan móti sjónum verður regulerað til linjuna millum neystini á matr. nr. 24 og 34a, og lendið selt fyri 110 kr./$m^2$
- at kommunan ongar útreiðslur kemur at hava av umskipanini
- at umsøkjarin verður kunnaður um, at í løtuni fyriliggja ongar ætlanir um gerð av vegi í økinum.

**UBN 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting 03-06-2016.

**HaVN 15-06-2016:** Nevndin tekur undir við UBN 13-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá HaVN 15-06-2016 einmælt samtykt.

## 60/16
## 16/00584 Uppískoytisstykki til matr. nr. 1613 - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 13.06.2016 | 48/16 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 23.06.2016 | 60/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
I skrivi til Klaksvíkar kommunu dagf. 20. mai 2016 biður Búnaðarstovan um kommununnar ummæli til umsókn frá borgara um keyp av grannageiranum sunnanfyri ogn hansara í Gerðum. Byggisamtyktarliga er talan um øki partvís í økisparti D5 (grønt øki) og partvís í C2 (almenn endamál).




**Lógargrundarlag:**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Við byggisamtyktarligu ásetingunum í huga, (C2 sum er útlagt til almenn endamál og D5 til park og náttúruøki) og tað, at økið liggur framvið landsvegi við innkoyringina til býin, og tískil vælhóskandi at fríðka við runnum o.ø, mælir Tekniska Umsiting frá, at lendið verður selt til víðkan av privatum grundøki. Mælt verður til at svara Búnaðarstovuni samsvarandi hesum, samstundis sum Búnaðarstovan verður kunnað um, at kommunan er áhugað í økinum til nevnda endamál.

**UBN 13-06-2016:** Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting 07-06-2016.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Tilmælið frá UBN 13-06-2016 einmælt samtykt.

## 61/16
## 11/00290 Bussleiðin víðkast til eisini at umfata Árnafjørð – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 17.05.2016 | 18/16 | |
| 2 Tekniska Nevnd | 18.05.2016 | 15/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2016 | 35/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð* | 26.05.2016 | 44/16 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 5 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð* | 23.06.2016 | 61/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 26. mai 2016.

**TrN B&U 17-05-2016:** Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 10.05.16. At leingja royndartíðina fram til 31.12.19 og at bussleiðin umfatar Árnafjørð.

**TN 18-05-2016:** Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá Tr.N. B&U 17-05-2016.

**FíN 24-05-2016:** Nevndin tekur undir við TN 18-05-2016.

**Býráðsins samtykt 26-05-2016:** Tilmælið frá FíN 24-05-2016 einmælt samtykt.

**Býráðsins samtykt 23-06-2016**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**